VINNARIN AV SMS-KAPPINGINI

Vinnarin av SMS-kappingini hjá Sosialinum í samstarvi við Smyril Line gjørdist:

Mary Marsten
700 Klaksvík

Mary vann ferðina til Blokhus fyri 2 vaksin og 2 børn við Norrönu við at SMS'a boðið 57.

Meira verður at lesa um hetta í Sosialinum í næstu viku.



Sosialurin

Deildarstjóri til starvsfólkaøkið

Heldur tú, at starvsfólk eru týdningarmesta tilfeingið, vit eiga?
Nú hevur tú møguleika at gera teg galdandi.

Starvið sum deildarstjóri á starvsfólkadeildini í Almanna- og heilsumálaráðnum er leyst at søkja til setan sum skjótast.

Deildarstjórin hevur ábyrgdina av virkseminum á starvsfólkadeildini í Almanna- og heilsumálaráðnum, har hesar fjølbroyttu uppgávur eru innan starvsfólkafyrisiting og HR-menning:
- At fyriskipa strategiskar menningarætlanir innan starvsfólkaøkið og ráðgeva í starvsfólkaviðurskiftum sum heild,
- At tryggja ein góðan starvsfólkatrivna, og standa fyri at starvsfólkapolitikkir verða orðaðir og dagførdir,
- At finna og fremja loysnir í truplum starvsfólkamálum og viðgera kærur,
- At útvega nýggj starvsfólk og virka fyri, at starvsfólk verða verandi,
- At luttaka í sáttmálasamráðingum og áseting av lønum,
- At menna eina felags lønarskipan fyri økið.

Virkisøkið hjá deildarstjóranum í Almanna- og heilsumálaráðnum umfatar alt almanna- og heilsuøkið. Samlað er talan um 2.400 ársverk og yvir 3.000 starvsfólk, sum eru starvsett í nógvu stovnunum innan økið og í stjórnarráðnum. Í mun til stovnarnar er talan um ráðgeving og fyriskipan av yvirskipaðum átøkum innan starvsfólkaøkið. Harumframt er stjórnarráðið kærumyndugleiki í mun til fyrisitingarligar avgerðir hjá stovnsleiðslunum.

Deildarstjórin er partur av leiðsluni í Almanna- og heilsumálaráðnum og vísir til aðalstjóran.

Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni umframt teir røttu persónligu eginleikarnar: duga væl við fólki, góð evni at samskifta og gera hugskot til veruleika. Tað er ein fyrimunur at hava hóskandi royndir frá líknandi starvi.

Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins, umframt 15% í eftirløn, men uttan at talan er um tænastumannastarv. Setanartreytir annars verða ásettar í sersáttmála.

Starvsøkið fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin er í løtuni Almanna- og heilsumálaráðið.

Tann, ið fær starvið, má kunna tola broytingar í virkisøkinum og møguligar umskipanir.

Umsóknir við avritum av prógvum, CV og øðrum skulu sendast til:
Almanna- og heilsumálaráðið,
Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn.
Ella til ahr@ahr.fo
innan kl. 12:00, 25. mars 2008.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á tel 304050.

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðamál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.

Vit draga eina línu - Vit seta skynsemi í hásæti - Vit vilja vita - Vit bróta slóð

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo

KREA